

BERA ELLA BRESTA

*Tá Neista-kvinnurnar í annaðkvøld á heimavølli taka ímóti StÍF, ræður um at vinna, tí annars er kjansurin fyri einari FM-finalu svunnin burtur í næstan einki*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Síðsta útkall Neistans

**HONDBÓLTUR** Skal Neistin fylgja við í oddastríðnum í Sunset-kappingini, krevst ein sigur, nú StÍF í annaðkvøld vitjar í Havn

Hilmar Jan Hansen

Í allan vetur hava kvinnurnar hjá Neistanum blandað seg upp í oddastríðið, har tær hava kappast við Stjørnuna og Tjaldur. Okkurt skifti hevur Neistin enntá verið fremst í bestu kvinnudeildini í hondbólti, men í løtuni er Neistin seks stig frá oddasessinum og fýra stig frá einum FM-finalusessi.

Neistin hevði møguleikan at styrkja sína støðu sunnudagin, tá tað tó ikki eydnaðist at halda fast og vinna á Stjørnuni í Klaksvík. Nú bert seks umfør eru eftir í Sunset-kappingini, koma ikki nógv fleiri kjansir sum tann, Neistin misbrúkti sunnudagin.

Ein er tó í annaðkvøld klokkan 19, tá StÍF kemur á vitjan í ítróttarhøllini í Havn. Undan hesum dystinum hava hesi bæði liðini spælt ein dyst færri enn hini, og havandi oddastøðuna í Sunset-kappingini í huga, er hetta ein lykladystur hjá Neistanum.

Við einum sigri kann Neistin minka um munin upp til Tjaldur, so hann bara verður tvey stig, og mótstøðan skuldi á pappírinum eisini verið yvirkomilig, tí StÍF er aftast á stigatalvuni við bara einum stigi.

Hinvegin kann eitt tap hava við sær, at Neistin dettur niður ímillum, so FM-finalan mestsum longu tá kann sigast at skula verða ein uppgerð millum Stjørnuna og Tjaldur, sum hava spælt FM-finalurnar síðstu tvey árini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Hylurin ov stuttur

**SVIMJING** Av tí at hylurin á Isle of Wight er millimetrar ov stuttur, kunnu góð úrslit á Oyggjaleikunum í summar ikki brúkast sum met – hvørki í altjóða FINA-høpi ella sum føroysk met

Hilmar Jan Hansen

– Tað er eingin ivi um, at var talan um eina stevnu, vit ikki plaga at fara til, so høvdu vit valt hana frá. Hetta eru lítið sømilig kor fyri eina so mikið dýra stevnu sum Oyggjaleikir, sigur Rókur í Jákupsstovu frá Svimjisambandinum, nú fyrireikararnir av svimjingini á Isle of Wight hava boðað frá, at svimjihylurin, ið skal brúkast á Oyggjaleikunum í summar, er nakrar millimetrar ov stuttur.

At hylurin tí ikki lýkur altjóða FINA-krøv, kemur illa við hjá bæði Svimjisambandinum og føroysku svimjarunum, tí svimjararnir ganga ikki bara høgt uppí at vinna heiðursmerki, men satsa eisini nógv upp á sjálvar tíðirnar, sum á Oyggjaleikunum ofta eru bæði persónlig og føroysk met og kunnu brúkast sum tilmeldingartíðir til eitt nú EM- og HM-kappingar.

Hetta hevur gjørt, at Svimjisambandið noyðist at endurskoða luttøkuna á Isle of Wight, hóast tíðin er knpp, so illa ber til at sleppa luttøkuni. Men hóast svimjararnir fegnir vilja halda fram við góðu úrslitunum og mongu heiðursmerkjunum á Rhodos og í Álandi, kann hetta fáa ávirkan:

– Tað er væl hugsandi, at summir av okkara bestu velja Oyggjaleikir frá, og spurningurin er tí, um Svimjisambandið heldur skal senda eitt breiðari lið, fyri at royna at vinna so nógv heiðursmerki sum gjørligt, heldur enn at satsa uppá, at nakrir fáir úrmælingar taka gullið, sigur Rókur í Jákupsstovu.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# FM í inniróðri leygardagin

**INNIRÓÐUR** Tá freistin var úti á midnátt, høvdu 89 róðarar og 18 lið meldað seg til óalmennu FM-kappingina í inniróðri, sum verður í Eysturskúlanum leygardagin

Hilmar Jan Hansen

Óalmenna FM-kappingin í inniróðri, sum hevur almenna heitið, Formula-kappingin, verður nú leygardagin. Sjálv FM-kappingin verður í aulini í Eysturskúlanum, men róðararnir fáa góðar møguleikar at hita upp í fimleikahøllini.

Tá tilmeldingarfreistin var úti á midnátt, høvdu 21 konufólk og 68 mannfólk meldað seg til, umframt sjey kvinnulið og 11 manslið. So her er heilt fitt av fólki til at kappast í teimum mongu bólkunum, ið eru hesa ferð.

Fyri at fáa fleiri konufólk við til kappingina, høvdu fyrireikararnir aftur í ár gjørt eina stafett bara fyri konufólk, har tað bara eru konufólk, ið kappast ímóti hvørjumøðrum. Harumframt eru eisini gjørdir fleiri bólkar, so javnaldrar kappast ímóti hvørjumøðrum.

Hjá teimum yngru eru fýra bólkar hjá konufólkum og fýra hjá mannfólkum, og bara ein vektbólkur er fyri hvønn bólk. Tey, sum eru 12 ár og yngri rógva 500 metrar, tey 13 til 14 ára gomlu, og bólkarnir 15 til 16 ár og 17 til 18 ár, rógva 2000 metrar.

### Við í fleiri bólkum

Opnu bólkarnir hjá kvinnum og monnum rógva eisini 2000 metrar, men har eru tveir vektbólkar fyri hvønn. Hjá kvinnum er lættvektsbólkurin 61,5 kilo ella minni og tungvektsbólkurin 61,5 kilo ella meira, og hjá monnunum eru tilsvarandi kilotølini 75 kilo ella minni og 75 kilo ella meira.

Somuleiðis eru bólkar hjá bæði kvinnum og monnum, 35 ár og eldri, ið rógva 2000 metrar, men har er bara ein vektbólkur.

Í bólkinum, ið kallast 500 metrar sprint, rógva kvinnur og menn samstundis, og her verður úrslitið roknað út eftir kyni, aldri og vekt. Brúktur verður ein serligur útrokningarfrymil, so tí kann kvinna saktans vinna á einum manni, hóast maðurin rør skjótari, tí tíðirnar verða lutfalsligar.

At enda eru so liðkappingarnar hjá kvinnum og monnum, sum eru í tveimum bólkum. Í øðrum bólkinum eru bara kvinnur og í hinum kunnu bæði vera kvinnur og menn. Hvør róðari rør 500 metrar, og eisini her verður serligi útrokningarfrymilin brúktur, so tíðirnar kunnu vera samanberiligar.

Róðarar kunnu vera við í fleiri kappingargreinum, so tað eitt nú ber til at rógva 500 metrar í sprintkappingini, 2000 metrar í opnum bólki og 500 metrar í liðkappingini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 18 | 514 | 421 | 93 | 30 |
| 2 | Tjaldur | 18 | 513 | 426 | 87 | 28 |
| 3 | Neistin | 17 | 461 | 394 | 67 | 24 |
| 4 | VB | 18 | 455 | 441 | 14 | 20 |
| 5 | Kyndil | 18 | 417 | 434 | -17 | 14 |
| 6 | VÍF | 18 | 406 | 497 | -91 | 7 |
| 7 | StÍF | 17 | 329 | 482 | -153 | 1 |